# Tórbjørn Olsen sýnir fram í Snarskivuni

**Í dag letur upp listaframsýning á Torginum í Snarskivuni, móttøkuni hjá Tórshavnar Býráð á gamla posthúsinum í Havn**

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*



Í dag, hósdagin, 14. november kl. 16.00, letur listamaðurin Marius Olsen upp listaframsýning á Torginum í Snarskivuni.

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, húsast saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum. Hugnaliga forhøllin, nevnd Torgið, verður eisini brúkt til listaframsýningar, sum mentamáladeildin skipar fyri.

Síðani Snarskivan læt upp, hava skiftandi framsýningar verið á Torginum, har føroysk listafólk hava sýnt fram, og nú er Torgið karmur um eina áhugaverda grafiska framsýning hjá Mariusi Olsen.

Hetta er ein sera fjølbroytt framsýning av etjingum og linoleums-, stein- og koparprentum.

Framsýningin verður hangandi uppi árið út.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í snarskivuni, mánadagfríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

# Seinastu sýningar av »List«



SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv frá Grímu*

Gríma lýsir nú við seinastu sýningunum av sera vælumtókta skemtileikinum, List.

Leikurin, sum síðani 1994 er farin sum rótasúpan um allan vesturlendska sjónleikaheimin, er eitt av stuttligastu og forvitnisligastu leik-ritum í nýggjari tíð. Leikurin speglar á sera gløggan og skemtingarsaman hátt list, lívsstíl og vinskap ímillum nútíðar menniskju.

Hetta verður lýst av franska rithøvundanum, Yasmine Reza, við humor og stórum tokka til teir tríggjar vinmenninar, Serge, Marc og Yvan, har Serge hevur keypt ein modernaðan málning – kritthvítur – fyri 200.000 frankar.

Hetta sleppur ikki at fara stillisliga framvið.

Í heilar 105 minuttir brestur eitt satt fýrverkarí av tilburðum og menniskjansligum reaktiónum á leikpallinum, sum vit øll kenna aftur, men kanska sjálvdan gera nakað við.

Vilja fólk sleppa at mýkja láturvøddarnar og okkurt at hava heim við sær her í myrku tíðini, so er tað nú í Leikhúsinum GRÌMU á gamla meiarínum.

Spælt verður soleiðis: hós- og fríggjadag kl. 20.00 og leygar- og sunnudag kl. 18.00, og fáast atgongumerkir á Kunningarstovuni, sigur Gríma í tíðindaskrivi.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum teimum, sum við gávum, telegramm og blómum og teimum, sum stukku inn á gólvið, sum gleddu meg á 70 ára føðingardegnum. Ein serlig tøkk til øll børnini fyri hjálpina.

**Signi og Milson**

# Jazz-café í Stóra Pakkhúsi

**Leygarkvøldið fara Klaus Telling og Edvard Nyholm Debess at framføra í Vági**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Leygarkvøldið fara klaverleikarin Klaus Telling og bassleikarin Edvard Nyholm Debess at framføra í Stóra Pakkhúsi í Vági.

Hetta er nýggj samanseting í føroyskum tónleikalívi og spennandi er at vita, hvussu hepnast. Tað er jazzur, sum er á skránni, tá teir fara at framføra á jazzcafé í Pakkhúsinum leygarkvøldið.

Stóra Pakkhús, sum fyri stuttum varð sett í uppruna – og sera hugnaligan – stand, er mentanar- og samkomuhús, har fleiri feløg eisini húsast.

Húsið verður nýtt til ymisk endamál og fleiri tiltøk eru í húsinum regluliga. Farið er undir at hava tónleikaframførslur og eisini jazzkvøldini verða ætlandi regliligur partur av skránni.

Áður hava Klaus Telling og Guðrun Jacobsen framført og Klaus Telling hevur eisini havt Chopin konsert í húsinum. Og eisini onnur hava staðið fyri tónleiki í húsinum.

Leygarkvøldið eru tað so Klaus telling og Edvard Nyholm Debess, ið standa fyri tónleikinum, meðan lurtarar kunnu njóta tónleikin í hugnaligum umhvørvi.








*Fert tú inn á www.olivant.fo, so finnir tú síðuna við Bilamarknaðinum. Har verða allir brúktir bilarnir at síggja, sum hvønn hósdag standa til sølu í Bilatorginum í Sosialinum – bæði teir bilarnir, sum bilasølurnar hava á sølulistanum og bilar, sum privat fólk hava til sølu*

# Selja bilar á www.olivant.fo

**Bilatorgið í Sosialinum nú eisini á olivant.fo**

BILASØLA

Sosialurin er nú farin undir eina nýggja tænastu á alnetinum, har tú hevur møguleikan at finna tær tann brúkta bilin, ið tær hóvar best – ella at selja tín brúkta bil.

Bilatorgið hevur verið í Sosialinum hvønn hósdag seinastu tvey árini. Har eru tað fyrst og fremst bilasølurnar, sum lýsa við brúktum bilum, men tað ber eisini til hjá privatfólki at lýsa har.

Hesa tænastuna hevur Sosialinum nú útbygt til eisini at fevna um internetið, og ber tað nú til at keypa og selja brúktu bilarnar á www.olivant.fo, har tað eisini eru leinkjur til bilasølurnar, sum lýsa har – og sum hava egna heimasíðu.

Ynskja fólk at fáa bilar til sølu í Sosialinum, so er bert at seta seg í samband við Sosialin á telefon 311820 ella við telduposti, *post@sosialurin.fo*

## Fimm ættarlið



*Her síggja vit fimm ættarlið… Pápin er Tommy M, Jacobsen, sum sæst uttast vinstrumegin. Oldurabbin, Arne O. R. Johansen situr við lítlu Leu Arnfríð Jacobsen. Langomman, Arngerð Joensen og abbin, Mark Joensen standa høgru mein*




